HOYVÍKSHØLLIN

Kappingarárið 2020-2021

# H71

## HEIMA Í HOYVÍK

FALDARI 3 | SUNNUDAGIN **1. NOV. 2020**



adidas

SMS-KAPPINGIN KVINNUR **H71-StíF** KL. 14.00

BURN-KAPPINGIN MENN **H71-StíF** KL. 16.00


Auto Service

BÓNUS -er biligari!

J&K

BYGMA BALSLEV

INTERSPORT Thomas Dam ítróttur

ADVOKATFELAGIÐ

LAIDERZ

SUÐUROYAR SPARIKASSI



*Fyrsti triðingur av landskappingini er avgreiddur – hóast korona hevur gjørt um seg – uttan útsetingar og við áskoðarum.* **Mynd: Álvur Haraldsen**

# IKKI SO GALIÐ EFTIR FYRSTA TRIÐINGIN

Fyrsti triðingurin av landskappingini er júst leiktur, og havandi verandi korona-støðu í huga, so kann ikki sigast annað enn, at hetta hevur spælt væl av. Allir dystir eru higartil leiktir uttan útsetingar, áskoðarar hava verið til dystirnar og – hóast átøk eru sett í verk kring dystirnar – so hevur tað á ongan hátt darvað hondbóltsupplivingarnar. Gaman í, nakað færri áskoðarar hava verið, men ikki soleiðis, at ein hevur varðhugan av, at fólk halda seg burturi frá hesi innandura ítrótt. Landskappingin í fótbolti koyrir eisini í fullum drøni, men hevur ein varhugan av, at nakað nógv færri áskoðarar eru til fótboltsdystirnar enn vanligt. Í fótboltinum kunnu atgongumerki bert keypast umvegis netið, og er einki at taka seg aftur í, at hetta kennist sera møtimikið fyri helst tilkomnar fótbóltsáskoðarar.

Fyri H71 hevur fyrsti triðingurin í hondbóltskappingini verið nøktandi. Sum kunnugt ræður „bert“ um í grund-

hallo·fo
nethandilin við góða úrvalinum, góðu prísunum og góðu tænastuni
www.hallo.fo – hallo@hallo.fo
Síðani 2000

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Hilmar Jan Hansen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent


BANKNORDIK
Ungdómsbankin
Njót løtuna
Lat okkum hugsa um teg
Meira enn ein banki
banknordik.fo/ungdomsbankin

spælinum at teljast millum fýra tey fremstu liðini og soleiðis tryggja sær sæti í hálvfinalunum. Kvinnurnar hava bert tapt ein dyst og soleiðis mist tvey stig, og tær liggja saman við Neistanum á einum deildum øðrum plássi aftan fyri Kyndil, sum hevur vunnið allar sínar dystir. Mennirnir hava tapt ein dyst og leikt ein dyst javnt, og teir liggja millum trý tey fremstu liðini. Nakað óvist er um neyvu støðuna hjá monnum, tá VÍF hevur kært, at Neistin frá dómaraborðinum fekk eitt eykamál, ið gav teimum javnleik í dystinum millum VÍF og Neistan. Missir Neistin hetta eykamál, so verða Neistin, VÍF og H71 jøvn í oddanum við trimum mistum stigum hvør í fyrsta triðinginum av landskappingini. Annars verður Neistin fremst, H71 næstfremst og VÍF triðfremst eftir fyrstu seks umførini.

Komandi dystir okkara eru ímóti StÍF, ið bæði menn og kvinnur okkara vunnu trygt á inni á Skála í fyrsta umfari í landskappingini. Menninir og kvinnurnar hjá StÍF hava bert vunnið tveir dystir í part í kappingini fyrsta triðingin. Kvinnurnar hjá StÍF hava vunnið á Stjørnuni og á VB, og mennirnir hava vunnið á Team Klaksvík og á Kyndli. Tí slepst neyvan undan, at H71 er favorittur at vinna hesar báðar dystir. Slíkt má tó ongantíð gerast ein koddi, tí tá kann ganga ógvuliga galið – ikki minst hjá kvinnunum, tí strandakvinnur í sínum fyrsta dysti í øðrum triðingi vundu burtur úr VÍF. So tað er eitt avgjørt krav til bæði kvinnur og menn okkara, at tey av heilum huga savna seg um hesar dystir og leggja alt í at vinna teir eisini, so vit enn betur kunnu stuðla undir støðu okkara í rætta endanum á stigatalvuni.

Eftir henda fyrsta triðingin av landskappingini er ein konturur farin at tekna seg fyri, hvør kemur at mynda hálvfinalurnar. Hjá kvinnunum eru Kyndil, H71, Neistin og VÍF á odda – tó so, at tað bert eru tvey stig á muni millum VÍF og StÍF um fjórða pláss. Hjá monnum eru Neistin, H71, VÍF og KÍF fremstir. KÍF hevur átta stig fyri átta dystir, meðan hini aftastu trý liðini hava fýra stig, Team Klaksvík tó fyri bert seks dystir, so tað er nakað opið um fjórða plássið í løtuni. Framvegis resta tveir triðingar av landskappingini, so nógv kann henda enn.

FISHFACTS

*Eitt klikk frá svarinum*

WWW.FISHFACTS.COM


NORÐOYA SPARIKASSI
Skalt tú keypa
hús ella íbúð?
Tosa við okkum um fígging
ns.fo
Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 Fax 47 6015 ns@ns.fo


www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

Tað besta ommaná
Forkela familjuna. Royn okkara
lekkiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

LAIDERZ

LBF

Dveylan
reingerð

Fiska
stykkið

STRANDA
MÁLING

magn

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

# H71

# H71

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SPEKT | løggildir grannskoðarar

PRISMA

Heini Weihe
DESIGN & CONSULT

VØRUHÚSIÐ

ADVOKATSKRIVSTOVAN

SALMON PROTEINS

ADVOKATFELAGIÐ




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN
EYÐIN DJURHUUS · JULIANNA KLETT



# VOLVO XC40

*Bilurin á myndini verður vístur við eyka útgerð





PRÍSUR ÚR

**398.000,-**

+ LEVERINGSKOSTNAÐ

**LEITAR TÚ EFTIR DREYMABILINUM?**

Hevur tú altíð droymt um ein bil, sum ikki er ov stórur, men alíkavæl rúmar nógv og har snið, tøkni, hentleikar og trygd ganga upp í eina hægri eind? – Ja, so er hetta dreymabilurin. Ger dreymin til veruleika! Kom og royn hann hjá P/F Wenzel, Volvo umboð í Føroyum.

Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00

WENZEL.FO








DESIGNA KØKAR BORG | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO

# LEVI AFTUR Á SLÓÐINA

Nú strandingar vitja í Hoyvík, er ein gamal kenningur hjá H71 við í ferðalagnum, tí síðstu átta árini hevur 38 ára gamli Levi Nybo verið partur av hondbóltinum í StÍF. Fyrstu trý árini sum málmaður, og síðani sum málmansvenjari og ungdómsvenjari – og hesaferð eru ørindi hansara at vera hjálparvenjari hjá norðurmakedónska venjaranum, Borce Markovski, sum er venjari hjá StÍF-monnunum.

– Øll árini á Strondum havi eg trivist sera væl í hondbóltinum har, so tað hevur bara verið fínasta slag. Forsøgan til, at eg endaði har, er nokk í høvuðsheitum tann, at eg fann mær konu í Gøtu, Birita Ingolfsdóttir, ið hevur mammu av Strondum. Tá ið vit so valdu at keypa hús á Strondum, var skjótt, at StÍF eisini lá framvið, og tá var tað so natúrligt at knýta seg til felagið, greiðir Levi frá.

– Teir bóðu meg koma at verja málið, og eg var so málverji har fyrstu trý árini, men síðani hevur tað bara verið onkra hendinga ferð, at eg havi spælt onkran dyst ella sitið á bonkinum. Hinvegin havi eg havt málmansvenjing alla tíðina og annars hjálpt til við teimum yngru, so eg havi verið í gongd í StÍF meira ella minni alla tíðina.

Levi var við til at vinna fyrsta føroyameistaraheitið hjá H71-monnunum í 2009, og tilsamans spældi hann við H71 í 13 ár.

– Eftir meistaraheitið spældi eg í tvey ár, áðrenn eg fór til Team Klaksvík í eitt ár, har eg fekk eitt so mikið gott ár, at eg var kosin Ársins málverji í 2012.

At eg endaði í Klaksvík komst av, at vit búðu eitt ár í Norðragøtu, áðrenn vit fluttu út á Strendur, og tá var tað høgligt at koyra til Klaksvíkar til venjing og dyst, sigur hann.

## Nógv hondbóltsprát

Levi letur annars væl at hondbóltstilveruni á Strondum, har StÍF er nakað, ið fyllir nógv í gerandisprátinum millum manna.

– Her er alt lokalt og øll standa saman um tað, og eg vil siga, at StÍF er ein partur av ílegunum hjá strandingum. Um tú møtir fólki á vegnum ella til handils, so verður prátað um hondbólt, og tað fyllir ótrúliga nógv, sigur Levi, ið tó vísir á, at tingini í StÍF kanska venda eitt sindur øðrvísi í vetur, enn tey annars plaga at gera tað.

– Nú tykist tað, sum at tað verður prátað eitt sindur meira um kvinnurnar, sum standa seg væl, meðan tað gongur eitt sindur meira striltið hjá monnunum. Kvinnurnar hava vunnið nakrar dystir á rað, og eisini síggja vit á yngru árgangunum, at har er gott fólk á veg til framtíðina hjá kvinnuhondbóltinum í StÍF.

Sum aðrastaðni, hava umstøðurnar nógv at siga fyri, hvussu væl arbeiðið í einum felag hilnast, og har letur hann bara heilt væl at. Ikki minst er tað komið væl við, at StÍF hevur fingið eitt nýtt og stórt venjingarrúm, sum er undir áskoðaraplássunum á vestursíðuni á ítróttarhøllini á Skála. Hetta eru umstøður, felagið slett ikki hevur havt áðrenn, so tað kemur sera væl við.

## Aðrar tíðir

Levi, sum sjálvur er tilflytari á Strondum, vísir eisini á, at felagið eisini tykist vera merkt av tí sannroynd, at fleiri fólk flyta til, tí bæði formaðurin og næstformaður í nýggju nevndini, sum varð vald herfyri, eru tilflytarar.

ANNIJANNI

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

Gjaldskort Netbanki Fígging FramtíðarKonta

Vitja okkum í Vági og Havn.

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

– Tað vísir kanska eisini, at tá ið fólk flyta til Strendur, so síggja tey tann týdning, StÍF hevur millum fólk. Eg minnist eisini frá H71, at tað tekur tíð at fáa ta mentanina undir húðina, sum skal til, og í Hoyvík eru sanniliga eisini nógvir tilflytarar. Tað var øðrvísi, tá ið eg spældi, tí tá vóru tað meira teir gomlu hoyvíkingar, ið myndaðu felagið, sigur hann.

– Tá vóru aðrar tíðir, tí tá var tað so ofta, at vit ikki av álvara byrjaðu fyrr enn eina ella tvær vikur fyri kappingina, og ofta var tað soleiðis, at vit næstan ikki fingu mannað lið. Men so broyttist alt, og tað er stuttligt at síggja, hvussu langt felagið er komið í dag.

Sum áður nevnt, var Levi í 2009 ein av teimum, ið skrivaðu søgu, tá ið H71 vann føroyameistaraheitið, og nú staðfestir hann, at tað síðani bara hevur gingið ein veg.

– Stórheitstíðin hjá H71 byrjaði, tá ið eg fór. Sjálvur byrjaði eg í Neistanum, har eg var við til at vinna øll meistaraheitini frá 10 ára aldri og upp til 18, tá ið eg fór til H71. Men eg eri stoltur av at vera hoyvíkingur, og eg arbeiði jú hvønn dag í Føroya Tele í Hoyvík, umframt at barndómsheimið og familjan eru niðri á Hvítanesi. Og kann eg ikki sjálvur vinna meistaraheiti, so vil eg helst hava, at H71 ger tað!




*Fyrsti triðingur av landskappingini er avgreiddur – hóast korona hevur gjørt um seg – uttan útsetingar og við a–Kann eg ikki sjálvur vinna meistaraheiti, so vil eg helst hava, at H71 ger tað, sigur gamli H71-málverjin, Levi Nybo, sum síðstu átta árini hevur verið knýttur at dagsins gestum úr StÍF*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

# 3 hálvleikur í Angus



**Bílegg borð á tel. 717777**

Vit svara millum kl. 11.00 og 22.00

**Vit stuðla kvinnuliðnum hjá H71**



ANGUS
STEAKHOUSE

Mynd: Gudmund Helmsdal




LAIDERZ

*Fokus på sportsfaciliteter*

# HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

**Graslíkisslag: JUTA MASTER 40/200 á EL25**



www.laiderz.dk



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

*Alt til* ***HITA***
***SANITET &***
***VENTILATIÓN***

**Maria Poulsen & Co**

**Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000**




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

# REINAR TENN BRENNA IKKI



## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25






## Visti tú at...

Vit ala á harðbalnum økjum fyri ikki at dálka umhvørvið.

Vit skapa og menna heimsins mest burðardyggu mannagongdir at ala laks.

HiddenFjord laksur svimur úr sjónum til góðskingarvirkið fyri ikki at gerast strongdur.



HiddenFjord laksur livir í einum av heimsins reinastu høvum við røttum sjóvarhita. Hetta er natúrliga umhvørvið hjá villa atlantiska laksinum.

Vit leggja stóran dent á at ala ein natúrligan laks uttan antibiotika og hormonir.

HiddenFjord laksur smakkar sera væl og er stak heilsugóður.

# ELIAS SKJÓTT KLÁRUR Í SVØRÍKI

Mánadagin 10. februar í ár kunngjørdi heimsins størsta hondbóltsfelag, IK Sävehof í Svøríki, við stoltleika – søgdu teir sjálvir – á heimasíðu síni, at felagið hevði tryggjað sær undirskriftina frá Eliasi Ellefsen á Skipagøtu, sum næstu fýra árini tørna út fyri felagið, ið hevur heimstað í Partille kommunu í einum av forstøðunum til Göteborg.

Avrikið hjá føroyska U17-landsliðnum, sum í fjørsummar vann European Open-kappingina í Göteborg, fekk mong eygu at hyggja at ungu føroyingunum, ið veruliga skaraðu framúr í kappingini. Ikki minst Elias, sum í sjálvari finaluni skoraði tíggju ferðir ímóti svensku vertunum og bæði gjørdist toppskjútti og kosin besti spælari.

– Áhugin var har beinanvegin, og kappingin var nóg illa liðug, so høvdu fleiri feløg úr ymsum londum sett seg í samband við meg. Tað var eg sjálvandi fegin um, men eg royndi so at vita, hvat mundi vera tað frægasta hjá mær at velja, og tá ið avtornaði, helt eg IK Sävehof vera besta felagið til mín, greiðir Elias frá í telefonini úr Svøríki.

Men hóast tað longu eru skjótt níggju mánaðir síðani fráboðanina um, at svenska felagið hevði tryggjað sær undirskriftina frá unga hoyvíkinginum, eigur hann enn fyrstu venjingina saman við nýggju liðfeløgum sínum til góðar.

– Eg havi verið skaddur, so tað hevur verið stóru trupulleikin, ið hevur forðað mær í at spælt nakað av hondbólti enn. Skaðin kallast „jumper's knee" og kemst av, at ein sina undir knænum er overvað.

Hetta er ein skaði, eg havi drigist við í eini tvey ár, men ikki fyrr enn nú havi eg fingið at vitað, at ein steðgur var neyðugur, skuldi eg sleppa undan pínuni, sigur Elias.

– Tað var ein danskur lækni, ið gjørdi meg varugan við, at tað frægasta var at taka ein steðg. Eg kundi valt at spælt við tí, men tað vildi verið nokk so býtt, tá eg bara eri 18 ára gamal og upp á henda mátan kann sleppa púrasta av við skaðan og pínuna.

## Gongur framá

Hóast Elias enn ikki hevur vant saman við sínum nýggju liðfeløgum, hevur hann verið til hvørja venjing og lærir teir betur og betur at kenna. Men einasta venjing, hann fær, er saman við fysioterapeutinum hjá felagnum, ið tekur sakina í størsta álvara, so úrslitið skal gerast nøktandi.

– Hon ansar øgiliga væl eftir mær, so alt er í tráð við ráðini frá danska læknanum, tá hon skipar dagligu venjingarnar við mær. Eg fekk eisini sproytur í knøini, so tað skuldi hjálpa, og tá skuldi eg bara binda frið, sigur hann.

– Eftir at eg hevði fingið sproyturnar, gingu tveir mánaðir, har eg einki skuldi gera við beinunum, so formurin fór púrasta av lagi og eg misti næstan allar musklarnar í beinunum. Tí kom eg eisini til Føroya at vera ta tíðina, tí tey í IK Sävehof hildu ikki, at nøkur orsøk var til, at eg skuldi vera har, tá ið eg einki fekk gjørt allíkavæl. Tá var líka frægt, at eg heldur var heima í Føroyum

So við og við kennir Elias á sær, at hann tekur seg fram, og síðstu tíðina hevur tað gingið so mikið væl framá, at hann hevur runnið eitt sindur seinnu dagarnar.

– Ikki fyrr enn nú havi eg fingið ein bólt í hondina, men venjingin við bólti er tó ikki annað enn, at eg kann venja brotskøst við vinstru hond. Orsøkin til, at eg bara kann brúka vinstru hond, kemst av



*Meðan Elias hevur fingið viðgerð fyri sín drúgva knæskaða, hevur hann ein part av tíðini verið heima í Føroyum, men nú er hann aftur í Svøríki og sigur, at tað gongur framá við venjingini*

einum øðrum skaða, tí eg havi eisini havt eitt sindur av trupulleikum í høgru øksl, so eg havi fingið greið boð um, at eg ikki má smekka til við høgru hond.

Av tí sama er tað heila kanska eitt sindur langligt, men nú framstigini eru farin at merkjast, verður tað alsamt hugaligari. Men hesin steðgurin hevur verið neyðugur og kann síggjast sum ein íløga í framtíðina.

– Felagið hevur víst stórt forstáilsi, og her siga tey, at tá ið eg nú havi ein so langan sáttmála, so vilja tey fegin hava, at eg skal vera góður næsta ár eisini og ikki bara í ár, flennir Elias, ið tekur tað róligt og ikki hevur hug at framskunda nakað, nú alt røkist fyri, at hann sleppur av við drúgva skaðan.

– Eg taki tað bara, sum tað kemur.

**Stórur munur á**

Ikki tí, brúk kundi saktans havt verið fyri Eliasi og hansara evnum á einum hondbóltsvølli, tí avrikini hjá IK Sävehof hava milt sagt verið svingandi. Liðini í bestu svenski mansdeildini hava spælt átta og níggju dystir, og av teimum 14 liðunum liggur IK Sävehof í skrivandi løtu á deildum sætta plássi – fimm stig aftan fyri oddaliðið, IFK Kristianstad.

– At tað hevur verið so nógv upp og niður, kemst helst av, at nógvir nýggir spælarar eru í hópinum, men tað er tó ikki beinleiðis nøkur vanlukka fyri felagið. Her er kappingin soleiðis skipað, at tað ræður um at enda millum átta tey fremstu liðini fyri at koma við til endaspælið. Men tá ið tað er

Framhald á síðu 37


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Friggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**

# Bussar til øll endamál

Í Føroyum og uttanlands







M B

**MOURITSEN´S BUSSAR**

Tel 32 21 21 · mb@mb.fo

Loysnir 214452


Ring 31 45 55
SKELTI
PRENT
PAPPÍR
Sjálvandi
Føroyaprent
LANDSINS STØRSTA PRENTSMIÐJA
Føroyaprent


Altíð okkurt
sunt og gott
fast:
www.fast.fo

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar

FAROE SHIP


Keyp vetrardekkini
hjá okkum.
Helst bestu prísir í landinum ...
WAAG
Tel. 613666
VREDESTEIN


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip

Framhald av síðu 27

sagt, so hugsi eg nokk, at felagið fegið vildi ligið eitt sindur fremri, enn tað ger nú, sigur Elias.

Hóast Elias sjálvur eigur fyrstu minuttirnar til góðar á einum svenskum hondbóltsvølli, er hann til allar dystirnar hjá IK Sävehof og fylgir sjálvand væl við kappingini annars.

– Ja, eg havi sæð nokk so nógvar dystir nú, og hóast eg ikki sjálvur havi verið á vøllinum enn, so dugi eg at síggja, at spælararnir eru bæði størri og sterkari, enn eg eri vanur við. Tað er tann størsti munurin á svenskum og føroyskum hondbólti, haldi eg. Og so gongur alt eisini munandi skjótari fyri seg, enn vit eru von við í føroyskum hondbólti, so tað verður helst eitt sindur av eini avbjóðing, tá ið eg komi í gongd, sigur hann.

Brennandi spurningurin er so, nær tað verður, tí higartil eru so skjótt níggju mánaðir farnir, síðani fýra ára sáttmálin varð undirskrivaður, og tað hoyrist millum orðini, at Elias so spakuliga er farin at ótolnast, tí tað er jú hondbólt, ið hann mest av øllum vil sleppa at spæla.

– Sum eg segði, so havi eg ein fysioterapeut, ið ansar sera væl eftir og er øgiliga varin, men um hon letur meg sleppa í gongd, so ganga kanska einar tvær vikur, til eg sleppi at venja við bólti saman við hinum. Og um alt gongur væl, so kann eg kanska spæla dyst um einar fýra vikur, men kanska skal eg brynja meg út til at skula bíða eitt sindur aftrat, so tað ikki verður fyrr enn um einar fimm-seks vikur, sigur Elias Ellefsen á Skipagøtu at enda í telefonini úr Svøríki.




*Her sæst Elias í svarta H71-búnanum, men í svenska felagnum IK Sävehof sleppur hann vónandi skjótt í nýggja búnan, har hann varðveitir svørtu buksurnar, men skiftir yvir til gula troyggju*

## H71

1 MIA **JULIUS**
16 FÍA **W. POULSEN**

2 ELSA **EGHOLM**
3 SILJA **SÁMALSDÓTTIR**
4 BRYNHILD **PÁLSDÓTTIR**
6 BJØRK **BRIMNES**
7 MARIA **HALSDÓTTIR WEYHE**
8 KARINA **EYSTURTÚN RUBEKSEN**
9 MARITA **MORTENSEN**
10 EVA BARBA **ARGE**
13 INGA MARIA **JOENSEN**
14 SUNNIVA **BOGADÓTTIR**
15 VÁR **BENTSDÓTTIR ZACHARIASSEN**
17 LÍV **BENTSDÓTTIR ZACHARIASSEN**
18 ELISABETH **HOLM SIMONSEN**
20 CHRISTINA **TURIÐARDÓTTIR ARGE**
24 BIRITA POULINA **MORTANSDÓTTIR**
31 SÁRA **JACOBSEN**
77 JANA **MITTÚN**

**VENJARI:** CARSTEN THOMSEN
**HJÁLPARVENJARI:** HALLUR DANIELSEN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**LIÐLEIÐARI:** ANDRAS MARR POULSEN

## StÍF

1 HANNA **LJÓSÁ**
12 JÓHANNA **MEYER**

2 EMMY **KASS**
4 REBEKKA **JUSTINUSSEN**
9 POULA **D. BERG**
10 FRÍÐRUN **OLSEN**
11 GUÐRIÐ **ELLINGSGAARD**
13 VÁR **D. POULSEN**
14 KARINA **HØGNESEN**
19 MAO **OTANI**
31 YUIKA **KURIMOTO**
83 HARUKA **GIMA**

**VENJARI:** JÓN RASMUSSEN
**HJÁLPARVENJARI:** MOMOKO NAKAMURA



### SMS-kappingin

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kyndil | 7 | 201 | 147 | 54 | 14 |
| 2. | Neistin | 7 | 214 | 166 | 48 | 10 |
| **3.** | **H71** | **6** | **186** | **150** | **36** | **10** |
| 4. | StÍF | 7 | 207 | 206 | 1 | 6 |
| 5. | VÍF | 7 | 192 | 205 | -13 | 6 |
| 6. | VB | 7 | 166 | 215 | -49 | 2 |
| 7. | Stjørnan | 7 | 161 | 238 | -77 | 0 |

FM-endaspæl (1.–4.)

## H71

1 ÁRI **DAM**
12 JÁKUP **N. THOMSEN**
16 JACKOB **NITHOLL THOMSEN**

2 SVEINUR **OLAFSSON**
3 HALLUR **BISKOPSTØ**
5 BOGI **DAVIDSEN**
8 PÆTUR **THOMSEN**
9 BOAS **HEINESEN**
10 DJÓNI **GAARD JOENSEN**
11 HANS KÁRI **HANSEN**
14 SIGMUNDUR **DAHL**
18 SAKIR **TRÓNDARSON FRÝDAL**
19 BALDUR **GILLASON**
24 NIKLAS **HØJGAARD HANUSARSON**
28 RÓI **ELLEFSEN Á SKIPAGØTU**
45 PETER **KROGH**
71 BOGI **HANSEN**

**VENJARI:** SIMON OLSEN
**HJÁLPARVENJARI:** PETUR MITTÚN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**FYSIOTERAPEUTUR:** ARI JÓGVANSSON
**LIÐLEIÐARI:** HANUS MORTENSEN
**LIÐLEIÐARI:** PETUR SIVERTSEN

## StÍF

1 PÓL **ANDREASSEN**
12 ELI **GÆRDUM**
16 MARKUS **E. JACOBSEN**

3 BJARNI **Í SELVINDI**
4 TUMMAS **SIMONSEN**
5 PÆTUR **Ó. BARCLAY**
6 BÚI **POULSEN**
7 PÆTUR **JOHANSEN**
8 DÁVID **DANIELSEN**
9 BÚI **POULSEN**
10 IVAN **MRDALO**
11 MARTIN **DANIELSEN**
13 SONNI **KNUDSEN**
17 EYÐBJØRN **ARGE**

**VENJARI:** BORCE MARKOVSKI
**HJÁLPARVENARI:** LEVI NYBO



## Burn-kappingin

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | VÍF | 7 | 211 | 184 | 27 | 11 |
| 2. | Neistin | 7 | 212 | 191 | 21 | 10 |
| **3.** | **H71** | **6** | **169** | **139** | **30** | **9** |
| 4. | KÍF | 8 | 202 | 192 | 10 | 8 |
| 5. | Team Klaksvík | 6 | 147 | 156 | -9 | 4 |
| 6. | Kyndil | 8 | 174 | 210 | -36 | 4 |
| 7. | StÍF | 8 | 191 | 234 | -49 | 4 |

FM-endaspæl

betri

NÚ 1,75%

# Vit **lække rentuna** á orkuláninum

## Skalt tú bjálva, umbyggja ella skifta vindeygu?

**Fyrimunir við orkuláni og grønari orkuloysn:**

- Minka um tína orkurokning
- Økja um virðið á húsunum
- Minka um $CO_2$-útlátið



**Ring 348 000**
og fá eitt prát um orkulán

betri.fo/**orkulan**